Men her var ein øgiligur gangur og rok. Viðhvørt fóru og komu tyrlur áttanda hvønn minutt. Alt var so skróturt av turkinum. So her var eitt rok av dusti hvørja ferð. Samstundis skuldi mann vera á klinikkini og arbeiða við sjúklingum. Men vit fingu hjálpt sera nógvum fólkum.

Summi lond góvu nokk so nógv fyri at hjálpa fólkinum. Tey sendu kornið við skipi til Djibuti, sum liggur við Reyða Havið. Men hiðani vóru flutningsmøguleikarnir sera ringir við vánaligum toksambandi og enn vánaligari vegum.

Av hesi orsøk varð kornið fyri ein stóran part liggjandi har og fór fyri einki. Tí kom tað eisini út millum fólk í vesturheiminum, at tað nyttaði einki at senda hjálp til tey svøltandi. Veruleikin var, at tey á staðnum høvdu ikki førleika fyri einsamøll at fáa hjálpina fram. Skal hjálpast, má hjálpin koma allan vegin fram til dyrnar hjá teimum, sum hava brúk fyri henni. Tað var júst tað, sum hendi hjá okkum.

## Avleiðingar av hungri

Ofta síggjast myndir frá hungursraktum økjum, har búkurin á børnum er so stórur.

Tað eru tvinni eyðkenni hjá fólki í slíkari støðu.

Hjá teimum, sum fáa ov lítið at eta, blíva armar og bein sera kløn og búkurin verður stórur. Eisini kemur hetta av, at børnini hava orm, sum kappast við tey um matin. Tað finst heilivágur fyri tí.

So eru tað tey, sum fáa skeivan mat við lítið av eggjahvítastoffum. Tá bar til at síggja gott út, men tað sást, at her var talan um skeiva føði. Tey blivu vatnut undir húðini, tí tey ikki fingu neyðugt eggjahvítastoff.

## Regn, men framvegis trupulleikar

Vit eru nú komin fram til páskirnar í 1974. Ein mánaða undan páskum fór at regna. Regnið var tó ikki so ógvisligt, sum tað tíðum var her í tropunum, heldur javnt og støðugt. Tað kom væl við, tí at her eru so at siga bara brekkur, og alt er uppdyrkað. Fyri at halda vætuna í jørðini, eru allar veltur laðaðar upp í trappum við gróti frammanfyri. Tessvegna er eisini stórur vandi fyri, at moldin verður skolað burtur, tá ið øgiligt regn kemur.

Nú var farið at næla alla staðni, og alt var avbera vakurt og grønt. Tað tekur tó sína tíð, til kornið búnast, so fólkinum tørvaði framvegis nógva hjálp enn, og hon helt eisini fram.

Síðan tað fór at regna gekk tað meira striltið við at frakta kornið til Konso. Vegirnir vóru so uppbloyttir, at tað var nærum óframkomandi hjá bilunum. Vanliga, tá ið tað er turt, koyra teir frá Arba Minch til Konso í 4 tímar. Nú nýttu teir fleiri dagar um ferðina, tí bilarnir lættliga standa fastir. Men her hjálptu tyrlunar væl, hóast tær ikki tóku so nógv hvørja ferð.

Red Barnet tók sær mest av sjúkrahjálpini og serliga hjá børnum. Nógv vóru sjúk av mattroti, og so komu umfarssjúkurnar. Tvær norskar sjúkrasystrar vóru her og gjørdu eitt gott arbeiði í bygdunum. Teir sjúklingar, sum vóru ringast fyri, vórðu sendir á klinikkina til viðgerð, sum kundi taka longri tíð.

## Læknin mátti lata sítt egna blóð

Tað er mangt sum hendir á klinikkini. Eg fari at greiða frá eini konu, sum var stungin við spjóti. Tað er ikki sjáldan, at tað hendi.

Klokkan hálvgum tvey eina náttina vaknaði eg við, at tað varð bankað á dyrnar. Eg fór fram at vita, hvør tað var. Uttanfyri stóð Kusia, sum helt vakt á klinikkini um næturnar. "Tú mást koma beinanvegin", segði hann, "tey eru komin við einari konu, sum er stungin við spjóti."

Eg skundaði mær niðan. Konan lá á einari børu við einum neytaskinni undir sær. Hon hevði fingið spjótið inn í búkin, og tað er torført at siga, hvussu hon sá út. Mín fyrsta hugsan var, at her var eingin vón.

Vanliga var eingin lækni á støðini. Ein lækni plagdi at koma ein dag eina ferð um mánaðin úr Gidole. Tá viðgjørdi hann teir sjúklingar, har vit einki kundu gera.

Var nakað akutt kundi koyrast til Gidole, har tað kom sjúkrahús og lækni eftir, at eg var komin. Hetta er bert 50 km. Burtur. Men á hesum vánaligu vegum tekur tað 2-3 tímar at koma fram.

Men til alla lukku var læknin Øyvind Solberg júst komin á sína vanligu vitjan kvøldið fyri. Okkum til hjálpar var eisini Kjelrun, konu Skúla, leiðaran á støðini. Hon var útbúgvin sjúkrasystir

Her var ikki nógv av framkomnari útgerð. Tað var greitt, at sjúklinginum tørvaði blóð, so nógv sum hann hevði mist. Tað vísti seg, at læknin hevði somu blóðtypu sum hendan konan. So læknin legði seg niður á eina brík. Eg tók síðan hálvan litur av blóði av læknanum og lat tað inn í æðrarnar á konuni. Læknin kundi so reisa seg upp aftur og halda á at arbeiða. Soleiðis kann eisini gerast, tá ið á stendur. Vit hildu á meginpartin av náttini.

Konan var við barn, men barnið var deytt, ein fullborin drongur. Fór hon eisini at doyggja, fór maður hennara, sum hevði stungið hana, at verða dømdur til deyða. So galið gekk tó ikki, men hann fekk so sína straff.

Men konan ressaðist við, og tá ið tríggjar vikur vóru farnar, fór hon heim frísk.

## Flettu geit á sjúkrastovuni

Tað vanliga var sum sagt, at læknin ikki var til staðar, og her skal verða greitt frá eini søgu um, hvussu hetta kundi ganga.

Eitt kvøldið komu teir við einum illa sjúkum ungum manni til klinikkina. Berarar høvdu borið hann langa og trupla leið. Tá ið eg kannaði mannin, kom eg fram til, at hann hevði "tarmslyng". Hann hevði ligið heima eina viku í vón um, at hann fór at batna. Men nú var hann so úttambaður og illa fyrikomin, at teir høvdu valt at koma higar.

Maðurin var so illa fyri, at tað var ikki hugsingur um ar flyta han til Gidole, har læknahjálp kundu fáast. Vegurin var so ringur eftir regn í fleiri dagar, at tað kundi neyvan koyrast ímillum í bili. Morgunin eftir tosaði eg við læknan, Øyvind Solberg í Gidole. Tá ið hann hoyrdi um støðuna hjá sjúklinginum, skuldu hann royna at koma við motorsúklu. Hálvan triðja tíma seinni var hann eisini framkomin brúnur av rununi, hann hevði koyrt ígjøgnum.

Hann fór beint á klinikkina. Sjúklingurin varð lagdur undir skurð, og tók hetta tveir tímar. Tað var framvegis sera óvist, um lív var lagað hesum manni. Læknin fór avstað aftur uttan at hava fingið ein bita, tí sjúklingar bíðaðu eftir honun í Gidole. Hann gav mær boð um ta røkt, ið skuldi gevast.

Í tríggjar vikur lá hesin maðurin og sveimaði millum lív og deyð. Hann fekk eisini bruna í skurðin og bøtti hetta ikki um støðuna. Hesa tíðina sat pápin hjá honum bæði dag og nátt. Men so fór hann at batna og fór so við og við at eta vanligan mat.

Pápin spurdi so meg, um sonurin nú kundi fara at eta kjøt, sum var tað besta honum dámdi. Ein dagin helt eg, at nú mátti hetta fara at bera til. Pápin var fegin og takkaði mær fyri.

Dagurin fór so við øðrum á klinikkini, men áðrenn eg fór til hús, hugdi eg inn til feðgarnar. Tá ið eg opnaði hurðina inn til sjúkrastovuna, sá eg eina ótrúliga sjón. Á gólvinum lá skinni av eini



*Fyri at halda vætuna í jørðini, eru allar veltur laðaðar upp í trappum við gróti frammanfyri*



*Her heldur læknin Solberg, sum er umrøddur í greinini, andakt við tulki*



*So ringt kundi tað vera at koyra*

nýflettari geit, og á tí lá høvdið og innvølurin.

Krovið var sundirlimað og var hongt upp í sjúkrastovuni á eina ás, sum var lagt millum báðar sengurnar, sum vóru inni á stovuni. Ungi maðurin sat uppreistur í seingini og tugdi við góðum matarlysti bita av hesum feska kjøtinum. Pápin sat húkandi á gólvinum og reinsaði vombina. Andlit teirra lýsti av gleði og nøgdsemi. Nú skuldu teir báðir hátíðarhalda, at sonurin var komin aftur til lívs!

Hóast sjúkrastovan ikki var rætta staðið at slakta eina geit, segði eg einki. Stutt eftir fór ungi maðurin saman við pápanum heim aftur. Sonurin hevði ikki bert fingið heilsuna aftur, men báðir vóru blivnir kristnir, meðan teir vóru á sjúkrahúsinum.

## Kommunistarnir taka ræðið

Hailie Selassi sat á trúnuni fram til 1974. Tá tóku kommunistarnir ræðið í landinum. Haile Selassie hevði vælvild fyri missón. Hann vildi fegin, at vit skuldu reka skúlar og sjúkrahús, tí hetta trongdi so nógv til. Myndugleikarnir hjálptu til á ymiskan hátt sum til dømis at